umhvørvisstovan

Ískoyti til umhvørvisgóðkenning hjá P/F Förka

sambært kapittul 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd

Navn á virki við góðkenning: **P/F Förka**	
Bústaður hjá virki: Á Hjalla 47, 188 Hoyvík	
Galdandi fyri virksemi: Móttøka og viðgerð av lívrunnum tilfari og framleiðsla av biogassi, ravmagni, hita og tilfari til tøð – íroknað nýggjan tilbúgvingar- og goymslutanga til K2-súrløgu	
Matr. nr.: 139ai	V-tal: 631957
Mál nr.: 26/24001	Galdandi frá: 4. november 2026

Argir, hin 4. november 2026

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

Rakul Mortensen, málsviðgeri

1. Fráboðan

P/F Förka hevur vegna P/F Salmon Proteins boðað Umhvørvisstovuni frá ætlan um at byggja ein nýggjan tilbúgvingar- og goymslutanga til K2-súrløgu á økinum hjá Förka á Skarðshjalla, matr. nr. 139ai.

Ætlaði tangin hevur eina bruttorúmd á 5.121 m^3 sambært innsendu byggistigsútrokningini. Tangin verður bygdur fyri P/F Salmon Proteins, sum eisini verður eigari av honum, meðan Förka stendur fyri verkætlanini og teknisku íbindingini. Tangin verður bundin í verandi móttøku-, pumpu- og viðgerðarskipanir hjá Förka.

Endamálið við tanganum er fyrst og fremst at økja um tilbúgvingar- og goymsluorkuna til K2-súrløgu, serliga tá stórar nøgdir skulu handfarast eftir stuttari tíð.

2. Góðkenning og heimild

Umhvørvisgóðkenningin hjá P/F Förka frá 24. apríl 2019 er givin við heimild í §§ 26, stk. 1, 29 og 31 í løgtingslóg um umhvørvisvernd og fevnir um móttøku av m.a. mykju, fiskaskarni og súrgaðum fiskaleivdum og framleiðslu av biogassi, ravmagni, hita og tilfari til tøð.

Sambært § 26 í løgtingslóg um umhvørvisvernd má eitt virki, sum er fevnt av kapittul 5 í lógini, ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, sum nertir við dálkingarviðurskiftini, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend.

Sambært pkt. 3.1.6 í galdandi umhvørvisgóðkenning skal biogassverkið frammanundan senda Umhvørvisstovuni skrivliga fráboðan, um virkið verður broytt byggifrøðiliga ella rakstrarliga soleiðis, at útlátið frá rakstrinum ella óhappum økist. Umhvørvisstovan tekur síðani støðu til, um neyðugt er við nýggjum metingum ella nýggjari góðkenning.

Umhvørvisstovan metir, at nýggi tangin ikki ber í sær eitt nýtt slag av virksemi, tí móttøka, goymsla og viðgerð av K2-súrløgu longu eru partur av virkseminum hjá Förka. Talan er tó um eina munandi øking í goymsluorkuni og harvið eisini eina broyting í váðanum við einum møguligum óhappi.

Umhvørvisstovan metir tí, at broytingin kann góðkennast við einum ískoyti til verandi umhvørvisgóðkenning.

2.1. Umhvørvisárinsmeting

Umhvørvisstovan hevur eisini mett broytingina í mun til góðkendu umhvørvisárinsmetingina fyri biogassverkið frá 3. apríl 2019. Sambært innsendu frágreiðingini broytir nýggi tangin ikki slagið av virkseminum, viðgerðarnøgdina ella elframleiðsluna, sum góðkenningin av árinsmetingini er grundað á. Umhvørvisstovan metir tí, at verandi umhvørvisárinsmeting framvegis er galdandi, og at tað ikki er neyðugt við nýggjari árinsmeting ella ískoyti til verandi árinsmeting.

3. Málsviðgerð

Grundarlagið fyri viðgerðina hevur verið fráboðanin frá Förka og innsend frágreiðing um umhvørvisárin frá nýggja tilbúgvingar- og goymslutanganum.

Tangin verður ogn hjá P/F Salmon Proteins, men verður staðsettur á økinum hjá Förka og bundin í verandi móttøku-, pumpu- og viðgerðarskipanir hjá Förka. Förka hevur fulla umhvørvisliga ábyrgd av tanganum og virkseminum, sum er knýtt at honum, mótvegis Umhvørvisstovuni.

Umhvørvisstovan hevur í viðgerðini serliga lagt dent á staðseting og teknisku íbindingina í verandi skipanir og virksemi, uppsamling og frárenning, váða við tangabroti, lukt og tilbúgving.

Nýggi tangin verður í høvuðsheitum ein betongtangi við PE-plastfóðring og tekniskari útgerð, so sum umrørarum, pumpum, ventilum, niveaumátarum, hitamátarum og neyðugari rør- og elútgerð.

Sambært innsendu frágreiðingini er økið kring virkið umgirt av einum 1,25 m høgum betonggarði. Uppsamlingsøkið er uml. 13.100 m^2, og effektiva uppsamlingsrúmdin er í frágreiðingini roknað til uml. 12.468 m^3. Hetta er umleið 2,4 ferðir rúmdina á nýggja tanganum.

Um eitt stórt útlát røkkur frárensli, kann frárenslið til kommunalu regnvatnsskipanina sambært innsendu frágreiðingini lokast í einum ventilbrunni uttan fyri betonggarðin.

Umhvørvisstovan metir, at broytingin kann góðkennast sum partur av virkseminum hjá Förka við hesum ískoyti, treytað av, at galdandi treytir og niðanfyri ásettu ískoytistreytir verða hildnar.

4. Ískoytistreytir

4.1. Staðseting og nýtsla

Nýggi tangin skal staðsetast og innrættast samsvarandi tí tilfari, sum er lagt fyri Umhvørvisstovuna í sambandi við málið.

Tangin er góðkendur til goymslu av K2-súrløgu. Onnur nýtsla, sum kann ávirka dálkingarviðurskiftini, skal frammanundan fráboðast Umhvørvisstovuni sambært treyt 3.1.6 í galdandi umhvørvisgóðkenning.

4.2. Konstruktión og tættleiki

Nýggi tangin skal lúka treyt 3.2.9 í galdandi umhvørvisgóðkenning. Tilfar og innrættingar í tanganum skulu harumframt vera egnaðar til K2-súrløgu og hava neyðugt mótstøðuføri móti innihaldinum.

4.3. Ávaring móti yvirfylling

Tangin skal hava ávaringarskipan, sum boðar frá, áðrenn hann er um at vera fullur.

Fylling av tanganum skal kunna steðgast á tryggan hátt, um ov høgt støði, brek ella annað óreglusemi verður staðfest.

4.4. Uppsamling og frárenning

Uppsamlingsøkið innan fyri betonggarðin skal vera innrættað og viðlíkahildið soleiðis, at innihaldið í største tanganum kann haldast aftur á virkisøkinum, um tangabrot ella annað stórt óhapp hendir.

Frárenslið til kommunalu regnvatnsskipanina skal kunna lokast á tryggan hátt, um eitt óhapp hendir.

Treyt 3.2.3 í galdandi umhvørvisgóðkenning er eisini galdandi fyri nýggja tangan.

4.5. Pumping og rørskipan

Fylling og tøming av nýggja tanganum skal fara fram í samsvari við treyt 3.2.7 í galdandi umhvørvisgóðkenning. Pumpur, ventilar og rørskipan skulu vera innrættað og viðlíkahildin soleiðis, at leki og spill verða fyribyrgd so væl sum gjørligt.

4.6. Luft og luktur

Tangin skal vera lokaður, og lúkur og onnur op skulu haldast afturlatin í vanligum rakstri.

Fylling og tøming skulu fara fram soleiðis, at ampi av lukti verður so lítil sum gjørligt, og galdandi treytir um lukt í umhvørvisgóðkenningini skulu haldast.

Um luktampar standast av tanganum ella virkseminum, sum er knýtt at honum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til at avmarka ampan.

4.7. Innaneftirlit

Nýggi tangin skal takast við í mannagongdirnar hjá Förka fyri regluligt eftirlit við tangum, ávaringarskipanum, pumpum, ventilum, rørskipan og uppsamlingsskipanum.

Eftirlit við styrki og tættleika skal fara fram samsvarandi pkt. 3.9.6 og eftirlit við sjálvvirkandi skipanum og ávaringarskipanum samsvarandi pkt. 3.9.7 í verandi umhvørvisgóðkenning.

4.8. Váðameting og tilbúgving

Áðrenn tangin verður tikin í nýtslu skal váðametingin og tilbúgvingarætlanin hjá Förka dagførast soleiðis, at nýggi tangin og møgulig óhapp í sambandi við hann eru fevnd.

Galdandi treytir 3.8.1–3.8.4 um váðameting, tilbúgving og útgerð til at steðga og taka upp eftir útláti eru eisini galdandi fyri nýggja tangan.

4.9. Ábyrgd

P/F Förka hevur mótvegis Umhvørvisstovuni fulla umhvørvisliga ábyrgd av nýggja tilbúgvingar- og goymslutanganum og virkseminum, sum er knýtt at honum.

Ábyrgdin fevnir m.a. um rakstur, eftirlit, viðlíkahald, áfylling og tøming, uppsamling og frárenning, lukt, tilbúgving og handfaring av óhappum og útláti.

Ognarviðurskiftini til tangan broyta ikki hesa ábyrgd.

5. Hoyring

Uppskot til ískoyti til umhvørvisgóðkenningina hjá P/F Förka varð sent P/F Förka, P/F Salmon Proteins, Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Tórshavnar kommunu til hoyringar 2. oktober 2026 við hoyringsfreist 16. oktober 2026.

Áðrenn formligu hoyringina hevði P/F Förka fingið uppskotið til viðmerkingar og boðað frá, at uppskotið var í lagi. Ein faktuell rætting viðvíkjandi matrikulnummarinum varð gjørd áðrenn hoyringina.

Tórshavnar kommuna hevur í hoyringarsvari sínum boðað frá, at hon ongar viðmerkingar hevur til uppskotið.

Aðrar viðmerkingar eru ikki móttiknar í hoyringartíðarskeiðnum.

6. Avgerð

Umhvørvisstovan gevur við hesum P/F Förka ískoyti til umhvørvisgóðkenningina frá 24. apríl 2019 fyri nýggjan tilbúgvingar- og goymslutanga til K2-súrløgu á økinum hjá Förka á Skarðshjalla.

Tangin er, hóast hann verður ogn hjá P/F Salmon Proteins, í umhvørvisligum høpi partur av virkseminum hjá P/F Förka.

Umhvørvisgóðkenningin frá 24. apríl 2019 og treytirnar í henni eru framvegis galdandi fyri virksemið hjá P/F Förka, íroknað nýggja tilbúgvingar- og goymslutangan, saman við treytunum í hesum ískoyti.

7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum.

Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana víðari til Heilsu- og orkumálaráðið saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd.